hava tey beint nú - dagin fyri at barnið kom í verðina – yvirtikið eini hús við Stoksoyrarvegin í Klaksvík.

– Vit sleppa tó ikki inn í tey beinanvegin, tí okkurt skal gerast við tey fyrst. Men um einar tveir til tríggjar mánaðir, so flyta vit inn í tey.

– Tað verður ordiliga gott, sigur Karl Jakob.

Í løtuni er helst óvist, um Karl Jakob sjálvur verðir við til innflytingina. Hann er fast við Skálaberg, men var heima henda túrin, nú hann skuldi gerast pápi á fyrsta sinni.

Sleppur hann at vera heima allan túrin, so skal hann ikki avstað aftur fyrrenn einaferð í juli, men verður tað bara til ein hálvan túr, er ikki óhugsandi, at hann longu skal avstað um miðjan juni.

**Svav og svav**

Tá vit vitjaðu nýggju foreldrini fríggjadagin - dagin eftir føðingina - stóð væl til.

Fyri okkum sum umboð fyri tíðindatænastuna var bert eitt at kæra okkara neyð um: Lítla dótturin svav og svav alla tíðina undir vitjanini.

Hóast nógv arbeiði og larm í samband við myndatøkuna, so eydnaðist okkum ikki at fáa eitt einasta brá av vøkru barnaeygunum á hesum fitta nýføðinginum.

Hon lat myndamann vera myndamann og tíðindamann vera tíðindamann. Eingin skuldi órógva hana í hennara væl uppiborna svøvni.

Vit gera okkum til at fara víðari, - hesaferð til tann elsta borgaran í Klaksvík, tann skjótt 100 ára gamla Eliesar Sørensen.

- Er hon ikki ótrúliga fitt?, sigur Karl Jakob brádliga, beint sum vit eru komnir í jakkarnar og eru á veg út í gongina.

Tað, eru tað ikki fleiri meiningar um!



*- Vit hava ikki avgjørt nakað navn enn til dóttrina. Men hon verður helst uppkallað eftir onkrum í familjuni, siga foreldrini bæði, Kristina og Karl Jakob*

*Mynd: Bárður*

# Chattaðu seg til kærleikan

**Hóast ein er staddur millum høgar bylgjur, so ber væl til at finna sær eina unnustu á landi. Alnótin er eitt heppið amboð í so máta**

KÆRLEIKI

*Snorri Brend*

**Skálaberg:** – Ja, er tað ikki løgið at hugsa sær: Eg bleiv forlovaður umborð, hóast einki konufólk var við skipinum!

Tað var ein stórur dagur á sumri 2003, tá tann nýggi Skálaberg kom á fyrsta sinni til Klaksvík. Stór móttøka varð hildin í hesum sambandi.

Tá Skálaberg so legði frá landi aftur var Karl Jakob ein av manningini, og hevur hann verið har síðani.

Hetta skipið er rættiliga væl útgjørt við allari útgerð, sum hoyrir til eitt slíkt nútíðar fiskisfar. Og manningin er heldur ikki við sviðusoð í so máta.

Umframt eitt stórt fitness-rúm finnast eisini í hópatali av teldum umborð. Og ein av brúkarunum av hesum teldum var Karl Jakob.

**Beit á**

Karl Jakob dámdi væl at sita við teldurnar, og eitt stað har hann vitjaði av og á var Faroese_chat.

Her hevði hann møguleika at chatta við gentur og dreingir í landi um øll verðsins viðurskifti, - eisini um kærleika.

Einu ferðina hann soleiðis sat og chattaði sat ein onnur genta í landi á Strondum og fekst við tað sama, sum eitt slag av dagdvølju.

Tey fingu "orðið" á hvørt annað, og byrjaðu at chatta meiri og meiri saman, og rættiliga nógv saman. Chatturin varð síðani avloystur av teldubrøvum, persónsmyndum og telefonsamrøðum, og mín sann um ikki telduposturin bar ávøkstur:

Tey avgjørdu at hittast, tá Karl Jakob kom í land næstu ferð. Hetta hendi so í januar mánaði í fjør.

Henda dagin fór Karl Jakob yvir land og legði leiðina út á Strendur, har hann á fyrsta sinni sá unnustuna, Kristinu standa har og taka so hjartaliga ímóti honum.

– Eg haldi bara, at tað hevur riggað væl, sigur Karl Jakob og hyggur yvir móti Kristinu. Tey brosa móti hvørjum øðrum.

Eygu hansara fara tó skjótt frá Kristinu og niður í vøgguna, har lítla dótturin liggur í fasta svøvni við sama lag. Hann kann snøgt sagt ikki halda eyguni burtur frá henni.

Vit skilja hann væl!

## Olivur við Neyst í Leikalund



Á Norðoyastevnu fer klaksvíkingurin Olivur við Neyst, at hava listaframsýning í Leikalund.

Olivur við Neyst er ein tann kendasti listamálarin úr Klaksvík, og hevur málað eitt ótal av málningum av Klaksvík, har myndevnini sum oftast eru landsløg, skip og fólk til arbeiðis. Á Norðoyastevnu fer Olivur at sýna fram oljumálningar, vatnlitsmyndir og steinprent, og framsýningin verður hangandi allan juni mánaða. Ferniseringin verður hósdagin 2. juni kl. 16.00, har kaffi og okkurt afturvið verður at fáa.

Olivur við Neyst er føddur og uppvaksin í Klaksvík. Hann er útbúgvin á listaakademinum í Keypmannahavn hjá Richard Winther og Wilhelm Freddie í árunum 1975-1979, og eftir tað fór hann á listanámsliga linju hjá Helge Bertram. Umframt at hann hevur havt óteljandi framsýningar, bæði í Føroyum og tað mesta av Skandinavia, hevur hann myndprýtt nógvar føroyskar bøkur og eisini verið við til at myndprýða Þorkeris skúla.

**ave**

## Friðarligt á vøllinum

Á Norðoyastevnu er vanliga nógvur fótbóltur á skránni. Vanliga verður spælt fríggjakvøld, allan leygardagin á tamb og sunnudag. Men í ár verður eitt sindur meira friðarligari á vøllinum.

Orsøkin er, at Føroyar spæla A-landsdyst ímóti Sveis leygardagin, og tá ið landsdystur er á skránni, leggur FSF ongar ungdómsdystir. FSF heldur fast um prinsippið, at øll skulu kunna fara til ein landsdyst í Føroyum.

Hetta merkir, at eingin ungdómsfótbóltur verður um vikuskiftið. Eisini 1. deild hjá monnum liggur still, men leygarkvøldið kl. 18.00 fara KÍ og HB at spæla steypadyst.

## Nógvir stevnuleikir

Fleiri talvkappingar eru á skránni á Norðoyastevnu, og kappingarnar eru bæði fyri børn og vaksin.

Hóskvøldið verður kapping í snartalvi, og tá kappast børnini frá kl. 17.30 og tey vaksnu frá kl. 20.30. Kappingin verður í Skákinum, sum er felagshøli hjá Klaksvíkar Talvfelag við Akursmørk.

Fríggjadagin verður aftur talvkapping kl. 19.00, og tá verður kappast á talvborðinum í Vágstúni ella í Skákinum, um tað ikki viðrar at telva úti.

Norðoyastevnuaftan kl. 19.00 fara bestu liðini hjá Klaksvíkar Talvfelag og Havnar Telvingarfelag at dystast í Skákinum.

## Arga og undirhalda

Klaksvíkar Sjónleikarfelag fer aftur í ár at spæla Norðoyastevnuteitið. Frumsýningin verður fríggjakvøldið kl. 20.00, og síðani verður eisini spælt hinar Norðoyastevnudagarnar og dagarnar eftir Norðoyastevnu.

Í teitinum verða ymisk aktuell mál tikin upp, men meira tíðarleysir smáleikir eru eisini á skránni. Undirhaldandi er tað í øllum førum, og nógv fólk plaga at fara til teitið.

## List í skúla

Norðoya Listafelag hevur sína árligu listaframsýning á Norðoyastevnu. Framsýningin verður í ár í skúlanum við Ósánna. Tað eru fyrst og fremst lokal listarfólk, sum sýna fram á hesari framsýning, men onnur listarfólk eru eisini við. Listaframsýningin letur upp norðoyastevnuaftan kl. 17.00 og hevur eisini opið frá kl. 15.00 Norðoyastevnudag.